## HALLÓ



## Einki at bíða við

*Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi*

**Føroysk toskakvotan á Flemmish Kap er tvífalt so stór í ár, sum í fjør, nevniliga 2200 tons. Nær heldur Sonny Johannesen, skipari, at besta tíðin er á Flemmish Kap?**
- Besta fiskitíð er um várið. Eg haldi, at politiski myndugleikin skal taka seg saman og útskriva loyvi sum skjótast. Dygdin á fiskinum er eisini best um várið, og tí er einki at bíða við.

**Hvussu eydnaðist royndin hjá Ennibergi á Flemmish Kap í fjør heyst?**
- Árið í fjør var hitt fyrsta í 11 ár, har vinnulig toskaveiða aftur varð loyvd á hesi leið. Vit byrjaðu túrin á svartkalvaveiði í Vesturgrønlandi og fóru síðan á Flemmish Kap at royna. Tá túrur var lokin, høvdu vit tilsamans 560 tons av skráskornum svartkalva og flaki úr góðum toski av Flemmish Kap.

**Hvussu var fiskiskapurin á Flemmish Kap?**
- Vit høvdu góðan fiskiskap tað mesta av tíðini. Soleiðis var, heilt til illveður kom á. Vit gjørdu eina stutta roynd eftir illveðrið, men raktu ikki við aftur og gjørdu av at sigla heim, sigur skiparin á Ennibergi, Sonny Johannesen, sum annars veit at siga, at rættiliga nógvur toskur var á Flemmish Kap í fjør vár.

# Norröna avlýsir íslandstúr




- Vit sigla upp á Ísland um veturin sum veður og vindur er til, og í hesum førinum missa vit farmin úr Íslandi, men eingi ferðafólk eru í klemmu, sigur Rúni Vang Poulsen.

Norröna siglir ikki túrin upp til Íslands hesa vikuna. Orsøkin er ring veðurlíkindi.

- Hann sigur storm alla vikuna og serliga norðan fyri Føroyar. Tí hava vit gjørt av ikki at sigla upp á Ísland hesa vikuna, sigur Rúni Vang Poulsen, stjóri á Smyril Line.

Hann sigur, at tey selja ikki ferðaseðlar til ferðafólk framman undan, men byrja at selja, tá greitt er, at siglt verður.

- Tí eru heldur eingin ferðafólk í klemmu orsakað av avlýsingini. Hinvegin missa vit farmin úr Íslandi, og tað eru vit sera hørm um, sigur Rúni Vang Poulsen.

## Í MORGIN

2/6 °C



11-16 m/s | 22-27 m/s

Stormur, møguliga upp í hvassan storm av útsynningi, seinnapartin minkar hann vindin niður í ein strúk. Ælingur, partvís kavi og hitin um dagin um 6 stig, um kvøldið niður í 2 stig.

## MIKUDAGIN

0/3 °C



22-27 m/s | 19-24 m/s

Skrið ella stormur av útsynningi, seinnapartin upp í hvassan storm. Kavæælingur og hitin millum frostmarkið og +3 stig.

## HÓSDAGIN

0/3 °C



22-27 m/s | 22-27 m/s

Stormur, upp í hvassan storm av útsynningi og vestri og kavaælingur, hitalagið um frostmarkið.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Skrið ella stormur av vestri og útnyrðingi og kavaælingur. Hitalagið yvirhøvur frostveður.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt djúpt lágtrýst, 965 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing. Brúgvalagið haðani fer um Førpyar í dag.




**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið við Ísland fer spakuliga norðureftir og hevur storm og kalda luft við sær.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 133 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -5 | Tromsø | -- | Moskva | 0 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 2 | Bergen | 0 | Berlin | 5 | Beijing | 0 |
| Tórshavn | 4 | Oslo | -9 | Paris | 13 | New Dehli | 19 |
| Lerwick | 3 | Stokkhólm | -4 | Madrid | 8 | Bangkok | 31 |
| Aberdeen | 4 | Keypmannah. | 0 | Róm | 13 | Sydney | -- |
| London | 13 | Helsinki | -6 | Malorca | 16 | New York | 0 |

## VESTFALLSKYRRINDI

22. jan. Mánin næstur jørðini
26. jan. Seinna kvarter
3. feb. Tendring
6. feb. Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 31. jan. | 04:38 | 17:03 | 03:38 | 16:03 | 03:53 | 16:18 | 06:38 | 19:03 |
| 1. feb. | 05:28 | 17:50 | 04:28 | 16:50 | 04:43 | 17:05 | 07:28 | 19:50 |
| 2. feb. | 06:13 | 18:35 | 05:13 | 17:35 | 05:28 | 17:50 | 08:13 | 20:35 |
| 3. feb. | 06:57 | 19:16 | 05:57 | 18:16 | 06:12 | 18:31 | 08:57 | 21:16 |
| 4. feb. | 07:36 | 19:56 | 06:36 | 18:56 | 06:51 | 19:11 | 09:36 | 21:56 |

| | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 31. jan. | 07:38 | 20:03 | 02:53 | 15:18 | 01:53 | 14:18 | 04:53 | 17:18 |
| 1. feb. | 08:28 | 20:50 | 03:43 | 16:05 | 02:43 | 15:05 | 05:43 | 18:05 |
| 2. feb. | 09:13 | 21:35 | 04:28 | 16:50 | 03:28 | 15:50 | 06:28 | 18:50 |
| 3. feb. | 09:57 | 22:16 | 05:12 | 17:31 | 04:12 | 16:31 | 07:12 | 19:31 |
| 4. feb. | 10:36 | 22:56 | 05:51 | 18:11 | 04:51 | 17:11 | 07:51 | 20:11 |

| | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 31. jan. | 05:53 | 18:18 | 04:23 | 16:48 | 05:38 | 18:03 |
| 1. feb. | 06:43 | 19:05 | 05:13 | 17:35 | 06:28 | 18:50 |
| 2. feb. | 07:28 | 19:50 | 05:58 | 18:20 | 07:13 | 19:35 |
| 3. feb. | 08:12 | 20:31 | 06:42 | 19:01 | 07:57 | 20:16 |
| 4. feb. | 08:51 | 21:11 | 07:21 | 19:41 | 08:36 | 20:56 |